FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

25. august 2021
Mál: 21/16037-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-021/2021

Svar til fyrispurning 52-021/2021 frá Bjørt Samuelsen, løgtingsmanni, um avbjóðandi støðuna hjá útróðrarflotanum

Spurningar:

1. Hevur landsstýrismaðurin nakrar ætlanir um at gera nakað fyri at styrkja og hjálpa útróðrarflotanum?
2. Um ja, hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera fyri at tryggja, at tey, sum liva av útróðri, hava líkinda kor og treytir soleiðis, at útróðurin framvegis kann vera livibreyð teirra?
3. Hevur landsstýrismaðurin nakra ætlan um, at leiðir, sum hava verið grundarlagið undir snellufiskiskapi, kunnu avmarkast ella heilt friðast fyri línu?

Svar:

Innleiðandi skal eg viðmerkja, at politikkur mín altíð hevur verið at geva útróðrarflotanum víðar ræsir at virka, tí hesin parturin av flotanum virkar í sjálvum sær undir ítøkiligum avmarkingum í dagliga virkseminum. Dømi um avmarkingar eru, at einstøku fiskiførini eru lutfalsliga smá og avmarkast ítøkiliga av náttúrugivnum viðurskiftum so sum streymi, veðri og vindi. Teir virknu dagarnir í sjónum, roknað fyri alt árið, verða tí lutfalsliga fáir fyri hvørt fiskifar.

Harnæst skal viðmerkjast, at kor og treytir fyri útróðrarflotan í hesum døgum ikki kunnu stílast til skipanina sum so, tí tøka dagatalið er størri enn tað, sum brúkt verður, og veiðiøkið nær landi er í høvuðsheitum skipað til útróðrarflotan. Harnæst er talið á virknum bátum í hesum døgum sera lítið. Plássið á veiðiøkinum til tann einstaka bátin er tí lutfalsliga stórt.

Orsøkin til vánaligu korini hjá útróðrarflotanum kunnu í størsta mun stílast til tað fiskaloysið, ið verið hevur seinastu tíðina í veiðini tætt við Føroyar eftir toski og hýsu. Fiskiskapurin er sera vánaligur samanborið við mong onnur tíðarskeið. Skipanin sum so gevur rúm fyri størri roynd, roknað bæði við grundarlagi í tali av óbrúktum fiskidøgum og

tali av bátum. Roknað undir einum, so brúkar útróðrarvinnan ikki møguleikarnar sum skipanin gevur rúm fyri, tá fiskaloysi er. Hetta er skilligt.

Til nr. 1.
Ongin ítøkilig ætlan er í umbúnað. Víst verður annars til innleiðsluna til svarini.
Eg skal tó vísa til skipanir, ið eru á økinum og viðkomandi fyri málið:

Trygdargrunnur fiskivinnunnar hevur til endamáls at tryggja tí einstaka fiskimanninum inntøkutrygd.

At sita fyri og hava ábyrgd av Trygdargrunninum verður stýri valt. Stýrið er mannað í góðari breidd við umboðum fyri reiðara- og manningarfeløgini.
Um stýrið ella umboð í stýrinum meta, at málið, ið spyrjarin reisir, krevur serstaka viðgerð, broytingar ella loysn, so meti eg, at stýrið tekur stig til hetta.

Til nr. 2.
Víst verður til svarið til spurning nr. 1.

Til nr. 3.
Í høvuðsheitum eri eg sera varin í spurninginum um at býta fiskiskapin við húki í útróðrarvinnuni upp í bólkar sum til dømis línu mótvegis snellu. Eg meti tað vera eina styrki fyri útróðrarvinnuna sjálva at kunna taka støðu til, nær og hvar roynt verður við til dømis línu, snellu ella dorg.

Tað frælsa valið um brúk av reiðskapi innan húkaveiðu gevur vinnuni sjálvari møguleika at laga til egnan fiskiskap í umstøðum, sum støðugt eru í broyting.

Av nevndu orsøkum er ongin ítøkilig ætlan í umbúnað júst nú at friða fleiri øki fyri línu.

Tó skal leggjast afturat, at eg eri altíð opin fyri at fremja broytingar, ið kunnu betra um umstøðurnar hjá útróðrarflotanum í síni heild.

Treytin fyri at fremja slíkar broytingar er millum annað, at broytingin stimbrar undir burðardyggan fiskiskap og tekur nøktandi atlit at allari heildini í vinnuni.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður